## Tók ár at skriva brúðarsang

Bæði Barbara og Noé arbeiða fulla tíð sum sangarar. Nú tey eru gift, verður Noé og trio hansara partur av somu møtirøð, sum Carlsen systrarnar hava verið við til í eitt ár. Í staðin fyri ein brúðarmarch í vígsluni, varð ein kærleikssangur, sum Noé hevði skrivað til Barbaru, spældur.
- Hann hevði skrivað niðurlagið tvey ár áðrenn vit møttust. Niðurlagið snýr seg um, at hann bíðar eftir tí røttu gentuni, og tá vit høvdu kent hvønn annan eina tíð, tók hann ørindi framm aftur og skrivaði sangin, greiðir Barbara frá.





*- Vit høvdu ikki ráð til nakað dýrt brúdleyp, men eg vildi hava tað so vakurt og hugnaligt sum møguligt. Húsið við tí vakra urtagarðinum hugtók meg, og eg vildi fegin hava eitt útibrúdleyp við innandura móttøku, sigur Barbara Carlsen*

mamman og systrarnar høvdu bjóðað seg til at gera nakrar føroyskar kakur, so við síðuna av borðinum við brúðarkakuni, stóð eisini eitt borð við góðum føroyskum kakum.

Brúðurin var í diamanthvítum kjóla og mamman, Miriam Carlsen, hevði seymað og broderað føroyskar brúdleypsvestar til bæði pápa brúðrina og brúðgommin. Vestarnir høvdu litir, sum passaðu saman við rósublað temanum.

Okkurt amerikanskt innslag var tó. Til dømis hava amerikanarar ein vana, har brúðurin kastar brúðarbukkett og brúðgomurin ger nakað líknandi.

- Brúðgómurin býtur hosubandið av brúðurini og blakar tað til støku menninar, eins og brúðurin kastar bukettina til gentirnar, greiðir Barbara frá.

### Amerikanskt sanglív

Tað er nú meira enn eitt ár, síðani at Vanja, Laila og Barbara fóru yvir til USA, har tær síðani hava ferðast nærum alt landið og luttikið á sokallaða Great Awakening Tour, sum samkoman River Church at Tampa Bay skipar fyri.

Victor Calsen, pápi tær tríggjar, sigur, at upprunaliga var ætlanin, at hetta átakið skuldi ganga yvir 2 ár, og tey hava longu vitjað á 25 ymiskum støðum, har vanliga møtirøðin byrjar týsdag og endar fríggjadag. Heimferð er vanliga leygardagar, lokal luttøka í heimasamkomuni sunnudagar, og so aftur útferð mánadag.

- Høvðusuppgávan hjá Vanju, Miriam og Barbaru er at syngja til øll møtini. Vanliga fáa tær loyvi at syngja tveir sangir, og ofta verða tær bidnar at syngja á føroyskum eisini, so áhoyrarnir kunnu frætta um og uppliva eitt sindur av føroyskum tilfari á møtunum, sigur Victor Carlsen.

Flestu møtir verða upptikin og send um fylgisvein, antin gjøgnum GOD TV ella aðrar vælkendar rásir í USA.



*Umframt brúðarkakuna fingu gestirnir eisini føroyskar kakur*

Sosialurin